


Annika Olsen
valevni Fólkafloksins
í Suðurstreymoy

**Íløgur í tey ungu**

- Ríkt lestrarumhvørvi - útbúgvingardygd
- Fjølbroyttir møguleikar fyri list
- Betri møguleikar fyri ung við børnum, undir lestri
- Nýhugsandi loysnir fyri barnafamiljur á arbeiðsmarknaðinum

XA
FÓLKAFLOKKURIN

WWW.ANNIKAOLSEN.NET

Sosialurin 341800

# Lokkandi tónar á Norðurbryggjuni

**KONSERT**
*Tíðindaskriv*



Tað verður spælt av fullum hugi, tá ið Svabos Spælimenn byrja koncertina á Norðurbryggjuni í Keypmannahavn mikudagin 21. januar kl 20.00. Teir fýra tónleikararnir Sharon Weiss og Kristian, Mikael og Rebekka Blak spæla fólkatónleik - bæði nýggjan og úr 18. øld - øldini tá ið pakkhusið varð bygt - sama øld sum Svabo sáli læs í Keypmannahavn. Og hvør veit, um ikki han man eiga okkurt sporið á Bryggjuni eisini. Við heimstaði í Føroyum og bakgrund í Danmark og USA framføra Svabos Spælimenn fjølbroyttan tónleik, ið speglar tann margfalda tónleikaarvin, spælimenninir fingu í vøggugávu; ein tónleikaarvur við felags undirtónum úr Norðurlondum og USA. Spælimenninir hava fyrr verið á koncertferð, og halda aftan á konsertina í Keypmannahavn leiðina fram til Hawaii.

Næst á skránni er bergtakandi songfuglurin Eivør Pálsdóttir, sum uttan fylgispæl syngur sínar egnu og sera persónligu tulkingar av føroyskum fólkatónleiki. Í seinasta tátti av konsertini kemur Yggdrsil á pall við jazzi og fylgispæli til sangin hjá Eivør - eitt samanspæl, ið bjóðar eina sterka og góða tónleikauppliving.



## Kommunurnar besta trygdin

Tann politiska skipanin í Føroyum byggir á tvær eindir. Eina lands- og eina kommunala eind. Uppgávubýtið millum land og kommunu hevur ikki verið ajourført í mong, mong ár. Í stórum kann sigast, at løgtingið ikki hevur haft serligan vilja til at fremja broytingar í uppgávubýtinum, og tá broytingar eru hendar, er tað næstan altíð kommunur, sum hava strongt á løgting og landsstýri fyri at fáa hesar framdar.

Í grannalondum okkara, hevur samfelagið skipað seg soleiðis, at kommunurnar eru vorðnar størri og størri. Hesa seinastu tíðina hava vit sæð somu positivu gongd her heima hjá okkum. Nógvar kommunur hava, og aðrar eru ávegis, skipað seg í størri kommunalar eindir ella størri samstarvsøki ásannandi, at tær í verandi støðu ongan førleika hava at loysa nakra samfelagsuppgávu av týdningi.

Fyri bygdar-, býar- og økismenningina er tað av allarstørsta týdningi, at kommunurnar virka væl og fáa ta mennandi ávirkan á sítt øki, sum ætlanin er.
Skal hetta eydnast mugu uppgávurnar, sum kommunurnar fáa at umsita, vera meira enn bert at hava atlit til at asfalt og betong.

Tvær høvðusorsøkir eru fyri øktum ábyrgdarbýti til kommunurnar.
Onnur er, at ongin er betri enn kommunurnar, at tryggja gott og neyðugt tænastustøði innan barnaansing, barnavernd, ungdómsarbeiði, mentunararbeiði, eldrarøkt v.m. Skjót hjálp er dupult hjálp.

Hin er, at kommunurnar koma at draga fólk við hægri útbúgvingum til sín. Hetta vil hava eina positiva ávirkan á menningina fyri ikki at tosa um inntøkugrundarlagið í kommununi.
Eitt triðja er so, at kommunupolitikkur í størri mun í framtíðini fer at snúgva seg um tey bleytu virðini og um trivnaðin í kommununi heldur enn bert asfalt og betong.

Kommunalu felagsskapirnir í Føroyum eru positivir í at yvirtaka málsøki eitt nú barnavernd og eldrarøkt, og vit eiga tí brúka henda gylta møguleika at lata hetta henda. Sjálvsagt skulu pengarnir fylgja við, so hvørt kommunurnar átaka sær uppgávur, sum landði í dag tekur sær av.
Tað er ein spurningur, um skipanin samlað gerst bíligari við at kommunurnar yvirtaka, men tænastan til borgaran verður munandi betri ongin ivi um tað.

Fólkaflokkurin fer so at gera sítt til, at kommunurnar fáa tillutað størri uppgávur, og m.a. barnavernd og eldrarøkt, í teirri sannføring, at kommunurnar eru besta boðið uppá eina góða og neyðuga tænastu.

Poul Michelsen
www.poulmichelsen.fo

XA
FÓLKAFLOKKURIN
*- Ábyrgd, álit og áræði*

team85



Skal alivinnan bara fara?

Kanska ein C vitamin hevði hjálpt!

Minst til C vitaminir!



JAVNAÐARFLOKKURIN C
*- nakað fyri C*